ítróttur

Nr. 65 • fríggjadagur • 2. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Vónir um graslíki í 2005

Norðurlendsku fótbóltssambondini høvdu í seinastu viku fund, har greitt varð frá arbeiðinum við at fáa altjóða góðkenning til graslíkisvallir

GRASLÍKI
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hesa seinastu tíðina hevur alt meira verið skrivað um, at sonevndu triðja ættarliðs graslíkisvallirnir skjótt kunnu fáa altjóða góðkenning.

Umframt at altjóða fótbóltssamgongurnar arbeiðir við hesum, so hava norðurlendsku fótbóltssambondini eisini skipað seg í einum áhugabólki, og í seinastu viku høvdu hesi fund í Reykjavík, har kunnað varð um, hvussu arbeiðið við hesum gekk.

Alt fleiri vallir av nýggja slagnum verða gjørdir í Føroyum. Eitt nú í Vági, har arbeiðið er komið væl áleiðis
Mynd: Álvur Haraldsen

Umhvørvisatlit

Og sum heild tykjast útlitini vera góð. Ein partur av kunningini var, at talan væntandi verður um eitt gjøgnumbrot á økinum seint í ár, men áðrenn tað kemur so langt, eru tó nógv krøv, sum skulu lúkast.

Eitt nú hevur ikki tað ikki verði so nógv frammi, at umhvørvisligi parturin av graslíkinum skal vera í lagi, áðrenn altjóða góðkenning kann koma upp á tal.

Í svenska høvuðsstaðnu, Stockholm, eru hópur av graslíkisvallum, og her eru tey í løtuni í ferð við at kanna, hvørt hetta kann hava nakra ávirkan á grundvatnið, eins og kannast skal, hvørji árin verðurlagsbroytingar v.m. kunnu hava á granulatkúlurnar, sum eru í vallunum.

Kanna skaðatíttleika

Sæð úr einum fótbóltssjónarhorni, so er eitt hitt týdningarmesta tó, at vallirnir so vítt gjørligt eru líkit vanligum grasi. Ikki bara tá tosað verður um sjálvt fótbóltsspælið, men so sanniliga eisini, hvat skaðum viðvíkur.

Áður hevur ofta verið nevnt, at leikarar – ið spæla á graslíki – í størri mun eru í vanda fyri at fáa liðbandsskaðar, men vónirnar eru í øllum førum, at nýggja ættarliðið av undirlagi hevur broytt hetta.

Í løtuni fara kanningar fram hesum viðvíkjandi, og eitt nú eru donsku superligufeløgini Brøndby, FCK og OB við í eini kanning, har ætlanin er at staðfesta, hvørji árinini eru í so máta. Hartil verða serligir rennitestir í løtuni framdir í Örebro, soleiðis at staðfestast kann, hvørt krøvini til hvíld v.m. eru størri á graslíki enn á vanligum grasi.

Føroyska umboðið í norðurlendska samtakinum er Rúni Heinesen. Hann kom upp í nevndararbeiðið hjá FSF fyri tveimum árum síðani, men undan hesum hevur hann oftani verið eftirspurdur, tá avgerð um graslíki skuldi takast.

Rundferð í nýggjum hami

HB er í fullari ferð við at markera 100 ára dagin, og hósdagin gav felagið út nýggja fløgu, har ein nýggj rundferð sjálvandi er partur av innihaldinum

FÓTBÓLTSFLØGA
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hetta er triðju ferð, at HB gevur út tónleikaútgávu. Fyrstu sangirnir komu á eini EP í 1979, tá felagið fylti 75, og tað er einki at ivast í, at sangirnir á hesari framvegis teljast millum stóru føoysku klassikarnar, tá tosað verður um fótbóltssangir.

Eisini undan jólum í 1993 – tá 90 ára dagurin skuldi markerast – kom nýggj útgáva, og nú er triðja HB-útgávan á marknaðinum.

Ikki bara fótbóltur

Sum ikki einaferð, so er tað Heri Nolsøe, sum er drívmegin aftan fyri sangirnar á fløguni, sum eru 14 í tali. Afturat sær hevur Heri tó eisini havt aðrar góðar kreftir, so sum Una Arge og Eyfinn Jensen, meðan fleiri nøvn, sum ikki hava verið á nakrari HB-fløgu áður, eru at hoyra millum mongu røddirnar á fløguni.

Og tað er lítið at ivast í, at eitt hitt heitasta lagið á fløguni er eitt nýtt fótbóltskvæði, har sangarar úr ymsu økjunum í landinum fara á ferð kring fótbóltsvallirnar í landinum. Menn sum Robert McBirnie, Ronnie Nielsen, Sámal Ravnsfjall, Karl Martin Samuelsen, Einar Jacobsen og Elis Poulsen fara her at syngja um vallirnar við heimstaðin.

Og so kann eisini skoytast uppí, at talan ikki bara er um eina fløgu til fótbóltsfjepparar. Talan er um sangir, sum eru bæði nýmótans og stillir, og innihaldið spennir víða um. Frá fótbólti – sjálvsagt – til sangir um tónleik og kærleika, so tað skuldi verið eitt sindur av hvørjum. Og verður talan aftur hesaferð um ta góðsku, sum HB-útgávurnar higartil hava havt, so er einki at ivast í, at eisini hendan útgávan verður ein av teimum, sum fer at liggja frammi í heilt nógvum heimum komandi tíðina. Eisini hjá teimum, ið ikki hava HB sum sítt felag.

Heri Nolsøe og Uni Arge við nýggju HB-útgávuni, sum sjálvandi hevur nakað við bólt at gera – men ikki bara
Mynd: Jens Kristian Vang

Meistararnir funnir

Dánjal Pauli Mohr og Per Kallsberg gjørdust føroyameistarar, tá finalan í FM-kappingini fyri pør var á skránni um vikuskiftið

BRIDGE
Bogi Simonsen

Leygardagin 27. mars varð finalan fyri FM Pør í Bridge leikt í Bridgehúsinum í Tórshavn. 20 pør høvdu ognað sær rætt at luttaka í finaluni umvegis eina semifinalu. Kappingin var sera væl fyriskipað og eiga fyrireikarinir stórt rós fyri hetta.

Finalan gjørdist ein av teimum meira spennandi, og alla tíðina skiftust tvey pør um at liggja á odda. Tey vóru, Høgni Vesturklett - Gunnar Mouritsen og Dánjal Pauli Mohr - Per Kallsberg, og fall avgerðin ikki fyrr enn í síðsta umfarið. Og umframt tey bæði fremstu pørini, vóru eisini trý onnur, sum alla tíðina lógu klár at taka yvir, so ráð vóru ikki at lora nakað sum helst.

Nógv mundu tey vera, sum vónaðu at ungu havnamenninir, Høgni Vesturklett og Gunnar Mouritsen, fóru at vinna, hetta tí teir enn ikki hava vunnu nakað FM Heiti. Men hetta eydnaðist teimum so ikki. Ístaðin gjørdist tað sigursvanda parið við Dánjal Paula Mohr og Per Kallsberg, sum streykt avstað við sigrinum

Spæl

Fyri at vinna eina FM-Finalu fyri pør, skal ein spæla sera væl. Hetta spælið er eitt gott dømi uppá tað frálíka spælið teir báðir Dánjal Pauli og Per vístu leygardagin.

Endaliga støðan

Par	Stig	Pláss
Per Kallsberg - Dánjal Pauli Mohr	146	1
Høgni Vesturklett - Gunnar Mouritsen	116	2
Hedin Mouritsen - Jóannes Mouritsen	102	3
Bogi Simonsen - Símin Lassaberg	85	4
Magni Jøkladal - Allan Dal-Christiansen	62	5
Reimund Langgaard - Vilhelm Nygaard	30	6
Salomon Johansen - Zakaris Joensen	2	7
Eydun Jensen - Niels Nielsen	-4	8
Jógvan Juel Rasmussen - Rói á Rógvu Joensen	-7	9
Mortan Rasmussen - Marjun Restorff	-10	10
Dia Petersen - Hans Egil Joensen	-15	11
Høgni Jacobsen - Finn Ougaard	-18	12
Eilif Petersen - Petur A. Johannesen	-22	13
Peter Sigurd Rasmussen - Hannis Jacobsen	-24	14
Ingibjørg Hansen - Oddmar Danielsen	-32	15
Dia Jacobsen - Marner Joensen	-40	16
Kaj Alstrup - Høgni Hansen	-42	17
Súsanna Dam - Jórun Johannesen	-75	18
Eydun Jakobsen - Pól Joensen	-124	19
Jógvan H. Andreasen - A. G. Nielsen	-131	20

Tað gjørdust sigursvandu Dánjal Pauli Mohr og PerKallsberg, sum vunnu FM-kappingina fyri pør, men teir fingu alla tíðina sera harðan dyst

17	BT75		N	E	S	V
N/-	K52		Per		Dánjal	Pauli
	K72					
	975		pas	pas	1hj	pas
KD3		E862	1sp	2rú	3kl	3rú
B97		86	pas	pas	Dbl	A.p.
643		EBT95				
KD43		62				
	94					
	EDT43					
	D8					
	EBT8					

Suður spældið spar 4 út, kongurin tók stikkið. Rútar 3 gekk via bóndan til damuna hjá sunnan, sum spældið spar 9 aftur,ið daman á borðinum fekk. Eystan spældi síðani ein rútara frá borðinum til rútar 10, sum tók stikkið. Nú kundi eystan spæla spar ess og spar til tann síðsta trumfin á borðinum og fáa síni 9 stingir og ein reinan top.

111 svimjarar úr øllum landinum far at taka lut, tá yngstu bólkarnir fara at kappast í Vági
Mynd: Øssur Møhr

111 Svimjarar hittast í Vági

Øll svimjifeløgini í landinum verða umboðað, tá teir báðir yngstu bólkarnir fara at kappast í Vági

SVIMJING
tíðindaskriv

SUM Smáunglingameistarakappingin í svimjing verður leygardagin 3 apríl í Vági

Hetta er meistarakappingin fyri yngstu svimjarar. Altso tey, sum taka lut í bólkunum 1 og 2.

Bólkur 1 er tey ið árg 95 og yngri, og bólkur 2 er árg 93 og 94.

34 kappingar verða svomnar og tað verða ialt 490 startir.

Luttøkan er stór, 111 svimjarar leypa útí til upphiting klokkan átta leygarmorgunin, og sjálv kappingin byrjar so klokkan níggju. Um middagsleitið verður ein steðgur, og kappingin verður tikin uppaftur klokkan trý seinnapartin leygardagin.

Seinni um kvøldið verður so ein lítil hugnaløta, og um hálvgum níggju tíðina hittast øll í Auluni í Vágs Skúla, har heiðursmerki verða latin vinnandi svimjarunum, umframt at luttakararnir so eisini hava møguleika at hugna sær saman ein løtu, uttan at skula hugsa um, hvør svimur so og so skjótt.

Genturnar hjá KÍF vunnu sína kapping

Flogbóltskapping á Kambsdali

Fríggjakvøldið varð árliga Konto-Inn flogbóltskappingin hjá ÍF hildin.

Hetta er kapping fyri gentur og dreingir 14, og fór kappingin sjálvandi fram í Høllini á Kambsdali, har flogbólturin hjá ÍF vanliga heldur til.

Endaligu úrslitini vóru, at SÍb tók sær av dreingjakappingini, meðan KÍFa tók sær av genturðini, og niðanfyri prenta vit myndir av teimum báðum vinnandi liðunum.

- jm

Hjá dreingjunum varð tað SÍb, sum streyk avstað við sigrinum